LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 16. mars 2026
J.Nr.: LUM-16- 26/05438-24
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

# Samandráttur av skrivi til Almanna- og heilsumálaráðið um viðgerð av innlitsumbøn frá Kringvarpi Føroya í sambandi við uppsøgn frá Landsapotekaranum

Løgtingsins umboðsmaður fekk tann 23. februar 2026 klagu frá tíðindafólki hjá Kringvarpi Føroya um viðgerðina hjá Almanna- og heilsumálaráðnum av eini innlitsumbøn.

Tíðindafólkið bað fyrst, tann 18. februar 2026, um innlit í tvey ítøkilig skjøl.

Ráðið svaraði tann 19. februar 2026, at tey skjøl, sum biðið varð um, funnust ikki. Ráðið vísti tó til eitt mál, har sjey skjøl vóru skrásett. Ráðið gav innlit í málsyvirlit og skjal nr. 2, 5, 6 og 7, sum var avrit av setanarskrivi, uppsøgn og víðarisendan av uppsøgn til viðkomandi partar. Tey skjøl, sum innlit ikki varð latið í, vóru sambært § 7, stk. 1 innanhýsis arbeiðsskjøl, sum skjalainnlit ikki var í. Mett var ikki, at ekstraherast skuldi úr skjølunum, av tí at talan var um privat viðurskifti hjá einstaklingum.

Klagarin bað síðani umaftur, tann 20. februar 2026, um innlit í skjal 1, 3 og 4 vísandi til, at hann ikki metti, at talan kundi vera um undantak sambært 12, stk. 1, nr. 1, sum undantekur privat, herundir fíggjarlig viðurskifti hjá einstaklinum. Klagarin vísti á, at talan var um viðurskifti, sum opinlýst høvdu beinleiðis samband við uppsøgnina og vóru skjalførd í sama máli. Klagarin vísti á, at § 12, stk. 1, nr. 1 er ætlað at verja privat viðurskifti.

Klagarin minti á umbønina tann 23. februar 2026, og tá hann ikki fekk svar, sendi hann á kvøldi 23. februar 2026 klagu til umboðsmannin.

Umboðsmaðurin bað ráðið senda sær skjøl og frágreiðing, sum umboðsmaðurin móttók tann 2. mars 2026.

Út frá skjølunum og málsyvirlitinum var trupult at síggja málsgongdina, og umboðsmaðurin bað tí ráðið senda sær frágreiðing um samskifti, og hvør kunning varð latin ymisku pørtunum.

Tann 10. mars 2026 sendi ráðið umboðsmanninum fleiri skjøl eins og nærri frágreiðing um gongdina í málinum.

Út frá hesum tilfarinum sást ikki, hvørjum málum ymisku sendu skjølini vóru skrásett undir.

Sambært § 7 í innlitslógini, fevnir rætturin til skjalainnlit ikki um innanhýsis arbeiðsskjøl. Innanhýsis arbeiðsskjøl eru skjøl, sum verða gjørd av einum myndugleika til egna nýtslu, brævaskifti millum ymiskar deildir innan fyri sama myndugleika og brævaskifti millum eitt bý- ella bygdaráð og tess nevndir, deildir og aðrar stovnar ella millum hesar stovnar sínámillum.

Tað er umboðsmansins fatan, at onkur av skjølunum ikki kunnu roknast sum innanhýsis skjøl, av tí at tey hava verið latin parti, advokati ella øðrum ráði uttan fyri Almanna- og heilsumálaráðið. Møguleiki at lesa og gera seg kunnugan við eitt skjal, kann harumframt eisini innibera, at tað missir sína innanhýsis støðu.

Talan er sostatt eftir umboðsmansins meting um mál, sum er fevnt av innlitslógini, og summi skjøl, sum ikki eru at meta sum innanhýsis, eins og eg ikki síggi, hvørt tey síðst sendu skjølini hoyra til sama mál.

Umboðsmaðurin hevur tí heitt á ráðið at umhugsa málið aftur, herundir hvørji skjøl ráðið hevur sum mugu metast fevnd av innlitsumbønunum tann 18. og 20. februar 2026, hvør skjalfesting er farin fram, og hvørji skjøl mugu metast at vera innanhýsis. Um skjølini ikki eru innanhýsis, eigur ein viðgerð at fara fram við støði í tí.

Ráðið er biðið um at lata umboðsmannin frætta, hvørja niðurstøðu ráðið kemur til, eins og mint var á, at talan var um umbøn frá fjølmiðli.

Hanna Vang

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður